**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fyrstilærari í Sumbiar Skúla

Starvið sum fyrstilærari í Sumbiar Skúla verður lýst til setanar frá **1. august 2002.**

Skúlaárið 2002/2003 verða 30 næmingar í 7 árgangum í skúlanum.
3 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum í Suðuroyarr skúladømi II við fyribils tænastu í Sumbiar skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal vera Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 6. juni 2002.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara.

**22. mai 2002**

**Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 – Fax 355055**
**e-postur: MMS@MMS.fo**

***Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# MAN 8.150

**Lastvognur v. 3 vegis vippulast og krana 3,5 tons, árg. '91**

**Nýsýnaður til sølu fyri kr. 70.000 + MVG ella hægsta boð yvir.**

Henning Thomsen (y)
Grótlaðari Tlf. 316739 - 283639

# Kunngerð

Sølan av trøum og runnum er byrjað á Gróðurstøðini, Hvítanesvegur 3, Hoyvík.

Í mai og juni mánaða verður opið soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag – fríggjadag: | kl. 12 – 17 |
| Leygardag: | kl. 10 – 14 |
| Sunnu- og halgidagar: | Stongt |

**Skógrøkt landsins**

# KUNNGERÐ

**Frá útskiftingarnevndini fyri Bíggjar bygd**

Næsti útskiftingarfundur verður í skúlanum í Bø týsdagin 4. juni 2002 kl. 10.30.

Metingin av kommunalu ognartøkuni verður á staðnum kl. 9.15.

Á útskiftingarfundinum verða metingar av kommunalu ognartøkuni og endaligur útskiftingarplanur fyri útskiftingina framløgd.

Útskiftingin verður endað og latin til ákæru.

Allir eigarar verða hervið boðaðir at møta.

**MATRIKULSTOVAN**
N. v.
Øssur A. Midjord
form.

Sosialurin

# Pedagogur/hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi/hjálparfólki til Barnagarðin við Velbastaðvegin 35 tímar um vikuna, at byrja 1. juni 2002.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3–7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Á hvørjari stovu starvast tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Viðkomandi, ið settur verður, skal duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvi saman við børnunum.

Løn og setunartreytir eru sambart sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 31. mai 2002 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO-100 Tórshavn

# Fyrstafloks seyðahegn

**50m X 90cm**
**Yvir og undirtráður 3mm**
**Millumtráður 2,5mm**
**Meskavídd**
**B. 15cm H. 14cm til H. 22cm**
**Galvanisering 240g/m2**

# Einans kr. 375,-

**Fa. H.J. Michelsen. Handan Á 6**
**tlf. 314414**
**Aftaná vanliga arbeiðstíð**
**263707**

# Fólk søkist

Vit sóknast eftir fólki til arbeiði í gólvhandli, at byrja beinanvegin.
Royndir innan øki, eru ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn, merkt "Umsókn", verður at senda til:

**Profa Farvur**
Staravegur 5 · Boks 3137 · Tel 31 92 20



# Deildarstjóri á nýggjari deild

Handilsskúlin er í støðugari menning. Stórar avbjóðingar eru fyri framman.

Til tess at møta hesum avbjóðingum hevur skúlin avgjørt at stovna eina menningardeild, sum hevur til **endamáls at:**
- skunda undir menningina á skúlanum
- samskipa átøk hvørs endamál eru áhaldandi at menna handilsskúlan, herímillum undirvísing á teimum ymsu stigunum..
- menna undirvísingarførleikan á skúlanum
- vaksa um útbúgvingartilboð fyrst og fremst á hægri stigi
- saman við stjóranum at stýra dygdarmenningini á skúlanum

Vit søkja eftir einum deildarstjóra, sum hevur áhuga í at arbeiða á einum skúla og hevur hug at arbeiða í leiðslutoymi.

**Høvuðsuppgávurnar verða í fyrstu atløgu at:**
- gera avtalur við hægri lærustovnar uttanlands og fylgja avtalunum upp í Føroyum
- samstarva við undirvísingar- og granskingarstovnar
- samstarva við møguligar stuðlar
- arbeiða við dygdarmenningini
- fjøltátta skeiðsvirksemið

**Tín persónmenska**
Um tú skalt trívast í arbeiðinum er týdningarmikið at vera opin, hava dirvi, hug at seta teg í nýggj viðurskifti, vera forvitin og broytingarhugað/-ur og varðveita hóvsemi, um nógv er at gera. Síðst men ikki minst, at tú hevur natúrligan myndugleika og ert eldhugað/-ur í sinni.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava:
- viðkomandi hægri útbúgving frá lærdum háskúla
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- vilja og evni at royna nakað nýtt
- áhuga fyri avbjóðingum
- evni at samstarva við onnur
- málsligan førleika at orða seg á føroyskum, donskum og enskum máli

Umsøkjarar við fyrisitingarligum royndum hava fyrimun.

**Vit bjóða:**
- eitt sjálvstøðugt starv í einum mennandi umhvørvi
- møguleikar fyri eftirútbúgving
- gott umhvørvi
- virknar starvsfelagar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Setanartreytirnar verða avtalaðar nærri við tann, sum settur verður. Lønt verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum skulu sendast til:
Føroya Handilsskúla, stýrið, Marknagilsvegur 77, Postmoga 177
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 7. juni 2002. Starvið verður sett frá 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, vinarliga ring Tel 317177 og tosa við Ragnar Magnussen stjóra á Føroya Handilsskúla.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel 317177, Fax 313374

# Handilslærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, baðirúmsútbúnað og líknandi, hava vit eitt lærupláss leyst at søkja.

Tú kemur at arbeiða innan øll økir í søluliðnum í fyritøkuni, so sum goymsluarbeiði, avgreiðsla og vegleiðing av kundum, útrokning av tilboðum og innkeyp við meira. Arbeiðstíðin er frá kl. 8.00 – 17.00.
Skúlagongdin fer í løtuni fram í Danmark.

Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði. Eisini gevur henda útbúgving góðar møguleikar fyri víðari útbúgving á mongum økjum.

Hevur tú HH er lærutíðin uml. 2 ár og hevur tú FHS er lærutíðin uml. 3 ár.
Byrjunarlønin fyri FHS'ara er kr. 8.176,90 um mánaðan og fyri HH'ara kr. 8.994,59.

Ætlanin er, at tú skalt byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum, so um tú verður liðug/ur við skúlan í summar, ert tú vælkomin at søkja.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum.

P.F. Svend Krosstein
Falkavegur - tlf. 31 46 00
VHS
All tilfar til VATN HITAVERK SANITET

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini størsta VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Vit eru umleið 20 starvsfólk, sum samstarva væl í einum góðum arbeiðsanda, har trivnaðurin verður høgt mettur.

# Goymslufólk

Hervið verður søkt eftir einum fólki m/k til goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt.
Fyrimunur er um umsøkjarin hevur goymslu- ella handilsútbúgving, men hetta er ikki nakað krav.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn.

P.F. Svend Krosstein
Falkavegur - tlf. 31 46 00
VHS
All tilfar til VATN HITAVERK SANITET

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini størsta VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Vit eru umleið 20 starvsfólk, sum samstarva væl í einum góðum arbeiðsanda, har trivnaðurin verður høgt mettur.

# Bilsmiður søkist

**Søkt verður eftir bilsmiði til mekaniska verkstað okkara skjótast møguligt**

SUBARU KIA
D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310-600